## Betri eftirlit við Statoil

Í Noregi hevur olju- og orkumálaráðharrin, Aslaug Haga, gjørt av, at StatoilHydro skal hava eigarafund fýra ferðir um árið. Statoil hevði slíkar fundir hvørt ár, til felagið bleiv lutvíst einskilt í 2001. Síðani hevur eingin tílíkur fundur verið fyrr enn í gjár. Aslaug Haga sigur við NTB, at eftir hennara tykki eigur tað politiska valdið at vera umboðað á eigarafundi í StatoilHydro minst fýra ferðir um árið, tí tað er umráðandi við almennum eftirliti, sigur hon.



*Aslaug Haga vil hava eftirlit við StatoilHydro (Mynd: Nordlys)*

## Náttúrufelag ivast

Grønlendska Náttúru- og Umhvørvisfelagið er ikki ímóti ætlanini at byggja eitt stórt aluminiumsvirki í landinum, men Jesper Guldager Labansen, formaður, heldur, at myndugleikarnir hava dekan ov stóran skund við at geva tey neyðugu loyvini. Hann sigur við útvarpið í Nuuk, at tað eru bara tvey ár, síðani málið kom fram, og at higartil hevur tað verið torført at fáa eina heildarmynd av ætlanini og ikki minst møguligum avleiðingum.





*- Vit hava sagt "farvæl" við Hetland – og góðan dag við Skotland, sum er ein nógv størri marknaður. Føroyingar hava tikið Skotland til sín, men vit fegnast sjálvsagt um tey vinarbond, sum knýtt eru millum føroyingar og hetlendingar, nú Norrøna hevur siglt hagar í fleiri ár, sigur Jákup Sverri Kass*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

fram til 28. februar. Vit hava bílagt eitt heilt nýtt sett av stabilisatorum, sum ætlandi verða settir í skipið í november í ár.

Jákup Sverri sigur, at tey, sum ætla sær ferðir til Noregs og Danmarkar um páskirnar – og tey, sum kundi hugsað sær skíferðir til Noregs eftir 28. februar, verða soleiðis ikki órógvað av, at skipið fer í dokk um hálvan februar.

- Íslandssiglingin hjá Norrønu verður tó ikki uppafturtikin fyrr enn 31. mars, leggur hann aftrat.

Sølu- og marknaðarstjórin sigur, at stórur áhugi er fyri páskatúrunum, og fólk fara vanliga av landinum vikuna fyri páskir.

- Hetta eru í stóran mun familjutúrar, har fólk vanliga eru burtur í 10 dagar tilsamans.

### Umbyggingar

Tað var í oktober í fjør, at Norrøna seinast var í dokk í Hamburg, og skipið var júst komið úr aftur dokkini, tá ið Norrøna rendi seg í herviliga illveðrið 11. november.

- Í heyst umbygdu vit alla buffe'ina og handilin við tollfríu vørunum, so úrvalið nú er størri, bæði av góðgæti, luktilsi, gávulutum og ymiskum drykkjuvørum. Vit hava eisini gjørt klárt til pizzaria uppi á sóldekkinum, sum letur upp, tá ið summarsiglingin byrjar. Vit hava fingið ein ovn á sóldekkinum, og vit meta, at hetta fer at gera umhvørvið uppaftur meira hugnaligt.

Jákup Sverri vísir á, at aftur í ár verður tað soleiðis, at børn upp til 12 ár kunnu eta ókeypis á buffe'ini saman við vaksnum.

- Nú buffe'in er umbygd, hava børnini eisini fingið sítt sjálvtøkuborð – í barnahædd, sum hann tekur til. Hetta tilboð er galdandi hvørt kvøld við fyrsta borðhald á páskatúrunum og alla summartíðina.

Hann sigur, at Smyril Line eisini hevur gjørt ymiskt fyri at betra um umstøðurnar og hugnan hjá børnunum.

- Tey smáu kunnu royna okkara stóra spælipláss við klintriborg, klintrineti, akibreyt og øðrum. Her hitta børnini sínar javnaldrar og finna nýggj vinfólk. Aftrat spæliplássinum, kunnu børnini eisini fara í biograf ella í svimjihylin, sigur sølu- og marknaðarstjórin.

### Lagaligari tíðir

Jákup Sverri Kass vísir á, at eitt, sum ferðafólk heilt avgjørt koma at merkja, er broytingin í siglingini um summarið.

- Vit hava broytt fráfaringar-og komutíðir, soleiðis at fólk ikki longur nýtast at fara upp á miðjari nátt. Áður kom Norrøna á Havnina klokkan 06. Tá noyddist tú sum ferðandi kanska upp longu klokkan 04, tí tú skuldi vera úti av kamarinum klokkan 05. Longu klokkan 08.30 sigldi skipið aftur, og tá noyddust eitt nú suðuroyingar – um teir skuldu vera vísir í at røkka lopið – at fara frá húsum longu kvøldið fyri.

Sølu-og marknaðarstjórin tekur eitt dømi:

- Eftir summarferðaætlanini fer Norrøna úr Føroyum fríggjamorgun klokkan 11 og kemur til Hanstholm leygardag klokkan 18. Síðan verður loyst aftur í Hanstholm leygarkvøld klokkan 22, og tá er skipið aftur í Føroyum mánamorgun klokkan 09.

Hann sigur, at Smyril Line í størst møguligan mun hevur lagað tað soleiðs, at komur og fráferðir eisini passa betri til føroyingar í hinum londunum, sum siglt verður til.

- Vit hava soleiðis fingið meira "luft" í okkara summarferðaætlan, leggur hann aftrat.

### Farvæl Hetland

Jákup Sverri sigur, at ferðamálini í summar verða tey somu sum undanfarna ár, men í summar verður ikki siglt til Hetlands. Ferðamálini eru útbygt við fleiri møguleikum og tilboðum, sum felagið væntar fara at síggjast aftur í summar.

- Vit hava sagt "farvæl" við Hetland – og góðan dag við Skotland, sum er ein nógv størri marknaður hjá okkum – eisini hvat viðvíkur øðrum ferðandi um Skotland heim til Føroya og víðari til Íslands. Høvuðsferðamálið er tó framvegis Danmark, men vit vænta, at eitt nú Skotlands-siglingin fer at geva eitt uppaftur størri "útslag" í summar.

Hann vísir á, at royndarsiglingin upp á Skotland í fjør summar vísti, at hetta er ein nógv størri og meira týðandi marknaður hjá felagnum.

- Í fjør summar bar ikki til at flyta stórvegis góðs millum Føroyar og Skotlands, og hetta verður helst tað sama í ár. Verandi atløga í Scrabster er ikki egnað til rampan á Norrønu, og tí er bert møguleiki fyri ferðafólkaflutningi, flutningi av persónbilum og húsvognum.

Væntandi er tó, at skotar, tá ið teir síggja, at Smyril Line fer at halda upp á Scrabster, við tíðini fara at umbyggja rampan nakað, so flutningur av fiski og øðrum góðsi eisini gerst møguligur.

- Føroyingar hava tikið Skotland til sín, men vit fegnast sjálvsagt um tey vinarbond, sum knýtt eru millum føroyingar og hetlendingar, nú Norrøna hevur siglt hagar í fleiri ár.

Jákup Sverri sigur, at hetlendingar framvegis eiga 23% av partapeninginum í Smyril Line, og óhugsandi er ikki, at teir við tíðini fara at selja sín part í felagnum.

### Tey ferðandi

Sølu-og marknaðarstjórin sigur, at Norrøna í 2007 flutti fleiri enn 60.000 fólk millum londini.

- Vøksturin úr Føroyum var eini 17%, men hóast hetta telja føroyingar "bert" 30% av teimum ferðandi við Norrønu um árið. Føroyingar eru soleiðis teir, sum samanlagt telja størsta prosenttalið, og á øðrum plássi koma týskarar og á triðja og fjórða plássi – og nøkulunda eins í tali – koma norðmenn og danir. Annars er talið av eitt nú hálendingum, fransmonnum, italiumonnum og belgiarum støðugt veksandi, leggur hann aftrat.

Jákup Sverri Kass sigur, at enn ferðast bretar ikki í ein stórum tali við Norrønu sum eitt nú týskarar, norðmenn og danir, men felagið væntar eina øking, sum tíðin gongur.

- Vit kunnu eisini siga, at tá ið talið av bretum enn ikki er so stórt, liggur eitt stórt potentiali í hesum marknaði, sum nú liggur meira opin við siglingini upp á Scrabster.

At enda letur sølu-og marknaðarleiðarin okkum vita, at prísirnir á ferðum við Norrønu í summar eru øktir umleið 5% í miðal.

- Øllum kunnugt, er oljan vorðin rættiliga kostnaðarmikil, og tí hava vit faktist lagt eitt lítil oljuavgjald á prísirnar, sigur hann.